# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

18. februar fingu Sólfríð og Hans Michael í Mittúni, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3600 gr.

19. februar fingu Rannvá Mortensen og Tóki Bjarkhamar, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4200 gr.

24. februar fingu Alika og Sigert Patursson, Vatnaskarðar, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3100 gr.

28. februar fingu Mona og Hanus á Gørðum, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3100 gr.

28. februar fingu Joan Djurhuus, Selatrað, og Helgi F. Strømsten, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

1. mars fingu Guðrið og Bárður Debes, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

2. mars fingu Guðni P. P. Andreasen og Jørgen Andreasen, Leirvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4750 gr.

## Merkisdagar

**45 og 50 ára føðingardagur**
Í sambandi við at vit í mars og apríl fylla 45 og 50 ár, halda vit felags føðingardag í Eydnuni á Oyrarbakka 10. apríl kl. 18. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin at boða frá á tlf. 422165 ella 226623 innan 25. mars. Heilsan Halljón og Elsa Annika Norðskála.

**60 ára føðingardagur**

Týsdagin 9. marts verða tvíburarnir Birita og Durita 60 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 6. marts í B36 húsinum. Vælkomst verður frá kl. 12.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 5. mars verður Erling Joensen við Gjógv 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**75 ára føðingardagur**
10. mars fyllir Torleif Matras, Fosságøta 7, Klaksvík, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 6. mars verður Paula Maria Olsen, Tórshavn, ættað av Eiði, 80 ár. Tey, sum hava hug at heilsa upp á Paulu, eru hjartaliga vækomin inn á gólvið úti á Suðuroyavegi 5 frá kl. 17.

**Diamantbrúdleyp**
Ruth og Robert á Lakjuni, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp í bygdarhúsinum í Leirvík 26. mars kl. 18.30. Tey, ið ynskja at gleðast saman við teimum hetta kvøld, biðjast siga frá, seinast hósdagin, tann 18. mars, á tlf. 444 332, fartelefon 744 332 ella við telduposti hg.vang@kallnet.fo

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúðleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn mánadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Brúdleyp**
Mikudagin 3. mars *giftust* Tamara í Túni, Toftir, og Karl Martin Stenger, Tønder, á ráðhúsinum í Holsterbro.

**Prógv**
Barbara Sonja Berg úr Havn hevur í februar 2010 lokið prógv sum kandidatur í námsfrøðiligari sosiologi á Danmarks Pædagogiske Universitet í Keypmannahavn.

# Anna Sjúrðardóttir 60 ár



Anna Sjúrðardóttir í Hvalvík, ættað úr Porkeri, fyllur 60 ár hin 5 mars.

Anna hevur verið nevndarlimur í Hvalvíkar missiónshúsið í yvir 20 ár og hevur gjørt eitt stórt arbeiði í meinigheitini, og nú hon leggur frá sær, verður stórur saknur í henni.

Hon hevur verið skrivari og havt skil á roknskapinum við kønari hond. Anna hevur arbeitt í banka í nógv ár, so tað fellur henni lætt við tølum. Eisini hevur Anna trúføstrøktsunnudagsskúlaarbeiði saman við øðrum øll hesi árini

Seinastu mongu árini hevur hon arbeitt innan eldraøkið og hevur tikið sær útbúgving sum heilsurøktari.

Vit í nevndini fyri missiónshúsið vilja við hesum takka tær, góða Anna, hjartaliga fyri tað stóra arbeiði tú gjørdi fyri húsið, og ynskja tær og familju tín hjartaliga tillukku við 60 ára degnum og Harrans ríku signing fyri framtíðina.

**Heilsan**
**Nevndin fyri Hvalvíkar missiónshús**
**Kirstin Jacobsen, form.**

# Anna Súsanna við tvíburum



1961
Mrs Johnstone (née Anna Susanna Poulson) from Griminish, Benbecula receiving her twin daughters, Winefride and Veronica from Sister Frances at the Sacred Heart Hospital, Daliburgh, South Uist. Mrs Johnstone was originally from the Island of Sandoy in the Faroes where she met and married her husband Angus during WWII. They settled back to Griminish Benbecula where they raised a family of 15 children.

Hendan myndin er send okkum av Cailean MacLean, blaðmanni á Isle of Skye. Hon er í eini bók, sum nýliga er útkomin við myndum frá oyggjunum South Uist og Benbecula á Hebridunum á vestursíðu Skotlands.

Myndin er tikin í 1961. Mamman við tvíburunum er Anna Súsonna Poulsen, ættað av Sandi.

Sambært myndatekstinum fingu hon og maðurin Angus tilsamans 15 børn. Um onkur veit meira um hesa familjuna, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Sosialin "Nøvn" tel. 341800.

## Dagurin

**5. mars. Teophilus**, deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir hin gudelskandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*